# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tryggingarmonopol og fleiri skattainn- krevjarar...

Tað er ein áhugaverdur spurnuringur, sum formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen, reisir í blaðnum í dag viðvíkjandi Arbeiðsloysisskipanini. Hann heldur tað vera margháttligt, at løgtingið hevur avgivið rætt til at krevja inn skatt til partarnar á arbeiðsmarknaðinum gjøgnum Arbeiðsloysisskipanina.

Vit skulu sjálvandi hava tað søguliga í huga, at arbeiðsloysisskipanin varð gjørd í ringastu krepputíð í Føroyum, og at skipanin var ein neyðsemja millum so ymiskar flokkar sum Javanaðarflokkin og Fólkaflokkinflokkin. Skipanin er kanska eisini ein av teimum kreppu- skipanunum, sum eingin torir nerta – eins og handverkarara- og rentustuðulin.

At skipanin er gjørd so samhaldsføst, at goldið verður í skipanina eftir inntøku, meðan øll fáa í mesta lagi eins nógv úr skipanini, er sjálvandi nakað, vit í dag kunnu seta spurningin við. Tað er sjálvsagt gott og rættvíst, at tey hægstløntu bera tyngstu byrðarnar, men hví skal tað vera ein grunnur, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum stýra, sum skal áleggja hendan eyka skattin? Tað er so avgjørt vert at seta spurnartekin við – uttan at taka stóra politiska málið um stættarsamfelagið við í kjakið.

Jørn Astrup Hansen er ikki hvør sum helst. Hann er fyrrverandi bankastjóri – og hann kennir rættiliga væl til føroyska samfelagið. Hann hevur eisini verið við til at bygt uppaftur føroyska búskapin eftir kreppuna. Og so dugir hann so sera væl at bera sín boðskap fram í almenna kjakinum – nakað, sum so mong onnur fólk í leiðandi størvum eisini áttu at gjørt.

Formaðurin í búskaparráðnum reisir eisini spurningin, um tað ikki hevði verið rættari, at hvør einstakur teknar sína egnu arbeiðsloysi- strygging. Hetta er ein so grundleggjandi spurningur – sum krevur nógv djúptøknari viðgerð, enn vit eru før fyri at gera á hesum stað. Men tað er sjálvandi rætt at venda hesum spurninginum. Men vit skulu ikki koma hartil, at tað skal bera til at velja hesa trygging frá, tí so dettur samhaldsfasta prinsippið burtur. Men eyðvitað kann tað gerast á ein smidligari hátt.

Nú hevur Jørn Astrup Hansen sett hol á orða- skiftið.Vit kasta hervið bóltin víðari – og seta fegin pláss av til hetta kjakið.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi. Ikki mannaorð um Gud

**RICHARD DANIELSEN**



**Trettandi partur**

Áðrenn eg sleppi Esaiasi profeti skal eg her taka nakað av tí, fram, sum hann sigur um stórleika Guds. Tað er so hugtakandi at lesa um, hvussu stórur Gud er, og hvussu smá vit menniskju eru ímóti honum. Hugsa um jørðina, hvussu lítil hon er aftur- ímóti øllum hinum skap- anarverkinum. Og vit halda tó, at jørðin er stór, og tað er hon eisini. Men hugsa vit um skapanar- verkið, so fer alt at mala runt fyri okkum. Vit kunnu ikki fata tað. Bara fyri at taka eitt dømi: Tak eina av hesum stóru stjørnunum, sum mala her uttanfyri okkum onkustaðni. Set hana har, sum sólin er, og hon hevði rokkið til okkara og gloypt jørðini Tað kundi verðið hugleitt meir um stj ørnuhimmalin,mjólkavegin og galaksinar rundan um okkum í tí endaleysu rúmd- ini. Men, tað skal ikki verða gjørt her, men tað svimlar fyri okkum, tá ið vit hugsa um hatta..Lat okkum heldur hyggja eftir, hvat Esaias sigur:

Dýrd HARRANS skal opinberast, og alt hold skal fáa tað at síggja - tí muður HARRANS hevur talað."

Fata tit einki? Hoyra tit einki? Er hetta ikki líka frá upphavi kunngjørt tykkum! Hava tit ikki skilt tað, frá tí grundvøllur jarðarinnar varð lagdur?

Tað er Hann, ið situr høgt yvir jørðini, so víð sum hon er, og tey, ið á henni búgva, eru sum grashoppur; tað er Hann, ið breiðir út himmalin sum tunt teppi og spennir hann út eins og tjald at búgva í.

Tað er Hann, ið letur høvdingar verða til einkis og ger dómarar jarðarinnar til beran tómleika.

Teir eru ikki meir enn plantaðir, teir eru ikki meir enn sáaðir, nóg illa hevur stelkur teirra rótfest seg í jørðini - tá blæsur Hann á teir, og teir følna, og sum hálm sópar stormur teir burtur.

Hvønn ætla tit tá at líkna Meg við, so Eg skuldi verið sum hann? - sigur hin Heilagi.

Lyftið eygum tykkara móti hæddini og hyggið! - Hvør hevur skapt alt hetta? Tað er Hann, ið førir her teirra út í ásettum tali og rópar tey øll við navni; so stór eru kraft og veldi Hansara, at ikki eitt saknast!

Veitst tú tá ikki, hevur tú ikki hoyrt tað? - at HARRIN er ævigur Gud; jørðina hevur Hann skapt, so víð sum hon er. Hann møðist ikki, Hann verður ikki máttleysur, vit Hansara er órannsakiligt.

Tí so sigur HARRIN, sum skapti himmalin, Hann, sum er Gud, Hann, sum virkaði jørðina og gjørdi hana, Hann, sum grundfesti hana - ikki til at liggja í oyði skapti Hann hana, nei, til bústað hjá fólki virkaði Hann hana -: Eg eri HARRIN, og eingin annar.

Kunngerið og sigið frá! Ja, ráðføri teir seg hvør við annan! Hvør hevur boðað hetta frá fornum tíðum, kunngjørt tað langt síðani! Man tað ikki vera Eg, HARRIN! Og eingin annar Gud er enn Eg, eingin rættvísur og frelsandi Gud er uttan Eg.

Vendið tykkum til Mín og verðið frelst, allir endar jarðarinnar! Tí Eg eri Gud, og eingin annar!

Um Meg sjálvan havi Eg svorið, av munni Mínum er sannleiki gingin út, orð, ið ikki skal verða tikið aftur: Fyri Mær skal hvørt knæ boyggja seg, Mær skal hvør tunga svørja trúskap! Úr Es kap. 40 og 45.

Jú sanniliga, tað er Harr- in ið talar í skriftunum. Hann hevur opinberað seg við tigandi talu síni í skapanarverkinum og svart uppá hvítt í skriftunum.

Tað, sum vitast kann um Gud, liggur teimum jú opið; Gud hevur gjørt teimum tað opinbert.

Ósjónliga vera Hansara, bæði æviga kraft og gud- dómleiki Hansara, sæst frá skapan heimsins; tað skilst av verkum Hansara; tey hava tí onga avsakan. Róm.1,19-20.

**Framhald**

## Bilførarin ábyrgdina av flestu ferðsluvanlukkunum

**RÚNA SIVERTSEN**
runa@runa.fo



Í septembur legði Statens vegvesen í Noregi fram eina greining av 226 deyðs- vanlukkum á norsku vegu- num í 2006. Kanningarnar vísa, at bilførarin í flestu førum hevði ábyrgdina av ferðsluvanlukkunum.

Sámal Matras Kristian- sen sigur í grein við Sosial- in týsdagin, at føroyskt ferðslukjak er druknað í moralisering. Teknisk átøk skulu til, heldur hann.

Men hetta er bara part- víst rætt, tí kanningar, sum normenn hava gjørt vísa nevniliga, at bilførarin í flestu førum hevur ábyrgd- ina av ferðsluvanlukkuni.

Í 75 prosentum av van- lukkunum, sum hendu á norsku vegunum í 2006, var tað vantandi førleiki hjá bilføraranum, sum var atvoldin til ferðslu- vanlukkuna.

Rúsur, møði, feilur við bilinum og vánalig skelting vóru eisini viðvirkandi orsøkir til deyðsvanlukk- urnar á norsku vegnunum í 2006.

Sambært kanningini var ov høg ferð ein avgerandi orsøk til ferðsluvanlukk- urnar.

Tað finnast tíverri ikki hagtøl ella nágreiniligar kanningar av ferðsluvan- lukkunum í Føroyum, men roknast kann við, at mynd- in er tann sama hjá okkum.

Sámal Matras Kristian- sen hevur rætt í, at tað eisini skulu teknisk átøk til. Men moralurin hjá bilførarunum fer altíð at hava tann avgerandi týdn- ingin fyri ferðslutrygdina.

- Vantandi førleiki hjá bilføraranum 75 %
- Ferð 49 %
- Rúsur 18 %
- Møði 18 %
- Ringt sýni (einki endurskin v.m.) 16 %
- Trupul koyrilíkindi 16 %
- Feilur/mangul við dekk/ hjólum 12 %
- Vánalig skelting 11 %
- Forðan fyri útsýni 11 %
- Sjúka 8 %
- Sjálvvald vanlukka 8 %

*Kelda: VG NETT*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl- an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.